## Sethúsaprísirnir hækkaðu nærum 10% í fjør

Hóast renturnar hækkaðu nógv í 2022 og 2023, fluttu bústaðarprísirnir seg ikki stórvegis hesi árini. Vanliga hava rentuhækkingar við sær, at bústaðarprísirnir fella, men í Føroyum hevur avmarkaða útboðið av bústøðum hildið hondina undir prísunum. Nú renturnar eru lækkaðar fýra ferðir seinasta hálvárið, sæst hetta aftur á sethúsamarknaðinum, har prísirnir aftur ganga uppeftir.

### 4,2 milliónir fyri eini sethús í Tórshavn

Í fjør kostaðu eini sethús í Tórshavn 4,2 milliónir krónur í miðal. Tað er 9% meira enn í 2023, tá miðalprísurin var 3,8 milliónir krónur.

Fyri restina av landinum var miðalprísurin 2,2 milliónir krónur í fjør, samanborið við 2 milliónir krónur í 2023. Tað er ein vøkstur á 10%.




Betri Heim staðfestir, at eftirspurningurin eftir bústøðum er stórur. *"Vit seldu munandi fleiri ognir í fjør samanborið við árið fyri, og gongdin sær út til at halda fram í ár. Við útlitum til fleiri rentulækkingar er í løtuni einki, sum bendir á, at prísirnir fara at fella"*, sigur Kára á Dunga, stjóri í Betri Heimi.

**Íbúðarprísirnir eru støðugir**

Á íbúðarmarknaðinum í Tórshavn hevur fermetraprísurin funnið eina legu um 35.000 krónur. Í fjør kostaði ein íbúðarfermetur 35.100 krónur í miðal. Tað er eitt vet minni enn í 2022 og 2023.




Íbúðirnar, sum vóru seldar í fjør, vóru tó størri enn íbúðirnar, sum vóru seldar árini frammanundan. Hetta ávirkaði prísin, tí smærri íbúðir hava vanliga ein hægri fermetraprís. Javnseta vit støddirnar á seldu íbúðunum, var fermetraprísurin í fjør 1% hægri enn í 2023 og 3% hægri enn í 2022.

**Fólkavøksturin er minkaður**

Síðan 2013 hevur bústaðarmarknaðurin verið undir alsamt størri trýsti, tí útveganin av nýggjum búeindum hevur ikki staðið mát við vaksandi fólkatalið. Henda gongdin er so smátt vend, tí meðan fólkavøksturin er minkaður nógv seinastu trý árini, hevur talið á nýggjum búeindum verið støðugt.

Í fjør løgdust líka nógvar búeindir afturat bústaðarhópinum, sum tað løgdust íbúgvar afturat fólkatalinum. Enn resta kortini á leið 800 búeindir í, um lutfallið millum íbúgvar og búeindir skal koma niður á sama støði sum í 2013.


Íbúgvar per búeind
2,8
2,7
2,6
2,5
2,4
2,3
2,2
2000
2001
2002
2003
2004
2005
2006
2007
2008
2009
2010
2011
2012
2013
2014
2015
2016
2017
2018
2019
2020
2021
2022
2023
2024
Føroyar
Miðal
betri banki